H E I L S U F R Ø Ð I L I G A   S T A R V S S T O V A N

Tórshavn, hin 18. mai 1999
Málnr.: 614-97-0014-7
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: RT

Elfelagið SEV
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

Mykinesar kommuna
FO-388 Mykines

**UMHVØRVISGÓÐKENNING**
**AV OLJUGOYMSLU Í MYKINESI**

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann veita Elfelagnum SEV og Mykines kommunu umhvørvisgóðkenning av oljugoymslu á matr. nr. 168 í Mykinesi.

Umhvørvisgóðkenningin er tíðaravmarkað til 5 ár frá tí degi, hon er almannakunngjørd.

Umsókn um at endurnýggja umhvørvisgóðkenningina skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í seinasta lagi eitt hálvt ár, áðrenn henda umhvørvisgóðkenning er úti.

**Umsóknin**

Mykines kommuna søkti um umhvørvisgóðkenning tann 23. februar 1998, meðan elfelagið SEV søkti um umhvørvisgóðkenning tann 10. mars 1999.

Saman við umsóknini eru móttiknar tekningar og frágreiðingar um innrætting av oljugoymsluni og upplýsingar um tær atgerðir, felagið og kommunan vilja fremja fyri at minka um dálkingina frá virkseminum.

**Lýsing av oljugoymsluni**

Goymslan skal umfata 6 tangar á 10.000 L.

Elfelagið SEV eigur 4 av tangunum, meðan Mykines kommuna eigur hinar báðar tangarnar.

Elfelagið SEV nýtir oljuna sum brennievni á elverkinum í oynni, meðan oljan hjá kommununi verður seld íbúgvunum í Mykinesi.

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 31 53 00**
Fax. **+298 31 05 08**
E-mail: feagency@hfs.fo

## Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á hesi viðurskifti:

- At trygdin og góðskan av tangunum og øðrum útbúnaði er í samsvar við galdandi normar og forskiftir, ið aðrir góðkennandi myndugleikar seta.
- At frárenslið frá oljuskiljaranum bert verður lagt í ánna fyribils, tvs. inntil kommunan hevur fingið eina fullfíggjaða spillvatnsskipan.

## Góðkenningartreytir

**1 Innrætting og rakstur**

1.1 Innrættingin skal fremjast sum í móttikna tilfarinum.

1.2 Betonggarðurin um tangarnar skal taka eina mongd av olju, sum svarar 10 min. í yvirpumpingartíð.

1.3 Membranurin undir tangunum skal vera tættur.

1.4 Betongplattur skal stoypast undir útflýggingarstaðnum hjá kommununi.

1.5 Tangarnir skulu vera góðkendir av Brunaumsjón Landsins.

1.6 Oljugoymslan skal vera innistikað og læst fyri óviðkomandi.

1.7 Øll rør til og frá oljugoymsluni og útflýggingarstaðnum skulu í mest møguligan mun vera niðurgrivin.

1.8 Sandfangsbrunnurin og oljuskiljarin skulu tømast regluliga soleiðis, at hesir altíð virka optimalt.

1.9 Lufttrýstspuling, kaldavfitingarevni og sápa mugu ikki nýtast á økinum, sum hevur tilknýti til oljuskiljaran uttan við klassing av tangum. Tá klassingin ferð fram, skal arbeiðast á skynsaman hátt og oljuskiljarin skal tømast regluliga, meðan arbeiðið verður gjørt.

1.10 Áðrenn oljuskiljarin verður tikin í nýslu, og hvørja ferð hann verður tømdur, skal vatn fyllast í hann aftur.

**2 Spillvatn**

2.1 Alt spillvatn frá oljugoymsluni og útflýggingarstaðnum skal leiðast ígjøgnum sandfangsbrunn, oljuskiljara og sýnistøkubrunn.

2.2 Spillvatnið eftir oljuskiljaran má ikki innihalda meira enn 10 mg/l av olju.

2.3 Spillvatnið kann leiðast í ánna, inntil kommunan hevur gjørt eina fullfíggjaða spillvatnsskipan, sum leiðir alt spillvatn á sjógv.

**3 Óljóð**

Tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A) frá goymsluni má ikki fara upp um niðanfyri standandi mørk í teimum nevndu tíðarskeiðunum:

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mána. - frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mána. – frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har meira larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

Tað mestloyvda óljóðstøðið frá goymsluni í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini.

**4 Burturkast**

4.1 Alt burturkast skal skiljast sundur í:
- brennbart
- ikki brennbart
- vandamikið

4.2 Tað, sum kann brennast, og tað, sum ikki kann brennast, eins og tað vandamikla burturkastið skal latast kommunalu burturkastsskipanini.

**5 Luft- og ljósdálking**

5.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær lukt- ella støvampar í nærumhvørvinum.

5.2 Nýtslan av ljósum skal vera soleiðis, at hetta ikki hevur við sær umhvørvisligan ampa.

**6 Óhapp**

6.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin tiltøk setast í verk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan kann góðtaka.

**7 Innaneftirlit, sýnistøka og skrásetingar**

7.1 Kanning av olju í frárensluvatninum skal fremjast eina ferð um árið. Tó kann sýnistøkutíttleikin broytast eftir góðkenning frá Umhvørvisdeildini.

7.2 Øll sýnistøka og kanning skal gerast av eini av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni góðkendari fyriskipan og starvsstovu.

7.3 Allar sýnistøkur skulu gjaldast av Elfelagnum SEV og Mykines kommunu.

7.4 Rakstrarbók skal førast, sum inniheldur fylgjandi upplýsingar:
- Nær sandfangsbrunnur og oljuskiljari eru tømdir
- Hvar olja og evja eru avhendað
- Rakstrartrupulleikar, óhapp og onnur viðurskifti, sum hava umhvørvisligan týdning.

Rakstrarbókin skal til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum.

## Almennar treytir

Virkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting. Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlitið við støðini. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

**Kæruvegleiðing**

Henda avgerð kann kærast til Føroya Landsstýri, sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðani sendir kæruna til Føroya Landsstýri við teimum skjølum, sum eru í málinum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Tórshavn, hin 18. mai 1999

Vinarliga

Bárður Enni,
stjóri

/

Jacob P. Joensen,
deildarleiðari

**Avrit:** Føroya Landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Landsdjóralæknin, FO-410 Kollafjørður
Náttúrufriðingarnevndin fyri Vága sýslu, FO-370 Miðvágur